ALS-skipanin endurskoðast

Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina hevur á fundi í gjár, 20. november, viðgjørt áheitanina frá landsstýrismanninum í Vinnumálaráðnum, Jóhan Dahl, um at fremja tillagingar í ALS-skipanini. Ein arbeiðsbólkur sat í 2003 til 2005 og gjørdi eitt álit um broytingar í ALS-skipanini, og tað álitið varð latið Vinnumálaráðnum í februar 2005. Samstundis sat ein serfrøðingabólkur og gjørdi eitt álit um ALS-gjaldið. Uppskot til broytingar í ALS-lógini sambært álitinum frá februar 2005 er enn ikki viðgjørt í løgtinginum, hóast málið er reist fleiri ferðir. Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina boðar í dag frá, at stýrið hevur tikið áheitanina frá Vinnumálaráðnum til eftirtektar og er farið í gongd við at endurskoða ALS-skipanina. Eitt nýtt álit um broytingar í Arbeiðsloysisskipanini verður latið landsstýrismanninum í vinnumálum so skjótt tilber. Hetta verður gjørt í tveimum, fyrst verður farið í gongd við at endurskoða Fiskavirkisskipanina og síðani Arbeiðsloysisskipanina.

Sólgerð við rótføroyskari barnabók

- Hetta er ein rótføroysk bók, ið setir fokus á ein part av okkara mentan, sum nógvastaðni er um at hvørva, sigur høvundurin, Sólgerð Andreassen

Í bókini eru myndir, sum stuðla tekstinum, og hesar hevur Martin Tórgarð, yngri, teknað

BÓKAÚTGÁVA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Í næstu viku kemur nýggj barnabók út. Heitið á bókini er »Knassi og Rokkarin«, og høvundur er Sólgerð Andreassen við Norðskála.

Bókin er um heimalambið Knassa, sum verður sett inn í fjósið saman við tí garvilla Rokkaranum, sum bæði happar, berjist og hyggur at gimburlombum.

Í bókini ger førilúsin eisini um seg og er óargalig. Tá ið ringast stendur til hjá Knassa, kemur ein vættur at ugga hann og at siga frá søgum.

Veðurlombini verða tó bestu vinir, og tey seta sær fyri at berja seg út aftur í frælsi.

Martin teknar

Høvundurin sigur, at dentur er lagdur á uppseting og snið, so bókin er løtt at lesa.

Í »Knassi og Rokkarin« eru myndir, sum stuðla tekstinum, og hesar hevur Martin Tórgarð, yngri, teknað.

Sólgerð sigur, at í bókini eru fakta, so børnini læra og minnast ymiskt, sum tey koma at seta í samband við søguna.

Barnabókin verður givin út á egnum forlagi sum er SANSAN.

Aðrar bøkur

Sólgerð Andreassen hevur eisini skrivað aðrar bøkur. Ein er »Berføtt ígjøgnum ælabogans litir«, sum er barnabók við 22 smásøgum, ið Sprotin gav út.

Hon hevur skrivað Náttúra og tøkni 3. høvuðsbók, lærarabók og arbeiðsbók til 6. fl.

Aftrat hesum verkum er hondbókin »Dýr og plantur í fjøruni«, sum Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út.

Nú kemur so eisini »Knassi og Rokkarin«, ið er ein rótføroysk bók, sum setir fokus á ein part av okkara mentan, ið nógvastaðni er um at hvørva.

Formenninir, Jan Højgaard og Viberg Sørensen, taka í hondina á hvørjum øðrum, eftir at feløgini eru vorðin samd um at framleingja verandi sáttmála í eitt ár

Einki verkfall í skipaflotanum

Tíðliga seinnapartin í gjár samdust Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið um at halda fram við verandi sáttmála í eitt ár aftrat

SEMJA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Tað gekk bæði skjótt og væl hjá feløgunum, sum umboða fiskimenn og reiðarar, at gera nýggjan sáttmála, sum er galdandi fram til 1. desember í 2009.

Fyrsti samráðingarfundur var týsmorgunin, og mikudagin var longu næsti fundur.

Í samrøðu við Sosialin týsdagin segði formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen, seg hava vónir um, at feløgini fóru at koma til sættis.

Í gjár segði formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, at tað ikki eru krónur og oyru, sum skilja partarnar hesaferð, og hann segði seg heldur ikki vænta nakrar broytingar í hýruprosentum.

Tó løgdu báðir formenninir aftrat, at ilt er at spáa um samráðingar – og at einki er liðugt, fyrr enn alt er liðugt.

Men nú er so longu alt liðugt.

Tíðliga seinnapartin í gjár samdust feløgini so um at framleingja verandi sáttmála fram til 1. desember í 2009.

Sostatt ræður friður í viðurskiftunum millum fiskimenn og reiðarar.

Við samráðingarnar seinasta ár endaðu fiskimenn úti í verkfalli, sum vardi út í januar mánaða í ár.

Dálkað hav beindi fyri hesi neyðars súlu

- Skulu vit »branda« Føroyar sum »heimsins reinasta oyggjaland«, noyðast vit øll at taka okkum saman, sigur lesari, sum hevur sent okkum hesar myndirnar

UMHVØRVI
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Í longri tíð hava vit á Sosialinum havt eina greinarøð um órudd, sum liggur og rekst kring um landið.

Men tað er ikki bara á landi, at »heimsins reinasta oyggjaland« gongur undir í óruddi. Er óruddiligt á landi, sæst hetta mangan eisini aftur á sjónum.

Í gjár fingu vit sendandi hesar myndirnar av eini súlu, sum er komin illa fyri á sjónum.

Myndirnar eru tiknar umborð á einum føroyskum línubáti undir Føroyum. Skiparin á bátinum sá, at súlan hevði tað ikki gott. Hon hevði fingið eitt band um nevið sum gjørdi, at hon ongan møguleika hevði at søkja sær føði.

Hann helt tí vera best at avlíva fuglin, sum síðan varð skotin.

- Myndin vísir, hvussu vit menniskju fara um náttúruna - í hesum førinum um havið. Skulu vit »branda« Føroyar sum heimsins reinasta oyggjaland, noyðast vit øll at taka okkum saman og gera nakað við tað, sigur lesarin, sum hevur sent okkum hesar myndirnar.

Ein deyðskomin súla, sum maður við línubáti skjeyt, tí hon ongan møguleika hevði at søkja sær føði